# Løgtingið skal staðfesta at ongin skal doyggja í ferðsluni

**Løgtingið skal nú samtykkja, at endamálið við ferðslulógini skal vera, at ongin skal doyggja ella fáa álvarsligan skaða í ferðsluni**

NULLHUGSJÓN
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*



*Nú skal tað verða eitt ítøkiligt og miðvíst endamál, við ferðslupolitikkinum, at ongin skal doyggja ella fáa álvarsligan skaða í ferðsluni og tað vil Bjarni Djurholm nú hava Løgtingið at staðfesta*

Endamálið við ferðslulógini skal vera, at ongin skal doyggja ella fáa álvarsligan skaða í ferðsluni.

Tað heldur Bjarni Djurholm, landsstýrismaður í vinnumálum.

Hann hevur nú lagt uppskot fyri Løgtingið, har hann vil hava tingið at samtykkja og sostatt at staðfesta, at endamálið við ferðslulógini skal vera, at ongin skal doyggja í ferðsluni, ella fáa álvarsligan skaða.

Herfyri var aðalorðaskiftið í Lgtinginum og tað vísti, at stór undirtøka er fyri at endamálið við ferðslupolitikkinum skal vera, at ongin skal doyggja í ferðsluni.

Tað er tað, sum vanliga verður nevnt nullhugsjónin.

Kortini endaði tað orðaskiftið ikki við, at Løgtingið gjørdi nakra formliga samtykt um at seta nullhugsjónina í gildi í Føroyum.

### Nullhugsjónin vísast í verki

Tí vil Bjarni Djurholm nú hava Løgtingið at samtykkja, at ferðslulógin skal hava nullhugsjónina til endamál.

– Sostatt skal nullhugsjónin verða stavnhaldið fyri ferðslupolitikkinum framyvir.

Bjarni Djurholm sigur, at fyri at nærkast málinum um, at eingin skal doyggja ella verða álvarsliga skaddur í ferðsluni, verður neyðugt at gera eitt miðvíst arbeiði á fleiri økjum.

Eitt nú skal upplæring og upplýsing um ferðslutryggan hugburð og atburð raðfestast so høgt, sum til ber.

Somuleiðis skal eftirlitið við ferðsluni gerast so gott, sum til ber.

Harafturat má ferðslulógin alsamt verða endurnýggjað og dagførd, so at hon fylgir við teimum broytingum, ið henda.

Eisini skulu akførini verða útgjørd við nýggjastu trygdarfyriskipanum, so at tey lúka fremstu trygdarkrøv

Tað er eisini neyðugt, at bæði kommunalir og landsvegir verða gjørdir alsamt tryggari við munagóðum og miðvísum ábótum.

### Prutl koyra skjótari

Bjarni Djurholm ger eisini greitt, at hann fer at leggja uppskot fyri Løgtingið um at prutl skulu sleppa at koyra 45 km um tíman. Sum er, kunnu tey koyra 30 km um tíman.

Men hann sigur, at bólkurin, sum viðger henda spurning, vildi hava betri stundir at gjøgnumarbeiða uppskotið, og tí verður tað ikki lagt fyri Løgtingið fyrrenn beint eftir Ólavsøku.

Tað var Bill Justinussen, sum vildi hava løgtingið at samtykkja at prutl skulu sleppa at koyra 45 km um tíman, tí mett var, at tað var vandamikið fyri ferðsluna, at prutlini orkaðu so illa at koyra í mótbrekku.

– Nøkur prutl eru so tung, at ein 16 ára gamal ikki til fulnar megnar at hava tamarhaldið, um hann missir ferðina í eini mótbrekku. At fá óhapp henda í hesum sambandi er tí, at so at siga ongi prutl eru lóglig og tí koyra skjótari enn 30 km um tíman, segði Bill Justinussen og tað tók Løgtingið undir við of eftir ólavsøku verður tað so eftir ætlan sett í gildi.

# Ein ógvuliga týdningarmikil byrjan

**Forkvinnan í Ráðnum fyri Ferðslutrygd sigur, at tað, sum hendir nú, er tað, sum tey hava bíðað eftir í nógv harrans ár**

FERÐSLUTRYGD
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*



*– Vónandi tekur løgtingið væl undir við ætlanini. Talan er um fá orð, men tey fara at fáa sera stóran týdning, sigur Rúna Sivertsen*

– Hetta er tað, vit hava bíðað eftir í nógv harrans ár.

Rúna Sivertsen, forkvinna í Ráðnum fyri ferðslutrygd, er ómetaliga fegin um, at ætlanin nú er at fáa løgtingið at staðfesta í sjálvari ferðslulógini, at endamálið við henni skal vera, at ongin skal doyggja ella koma álvarsliga til skaða í ferðsluni.

Tað er hetta, sum verður kallað null-hugsjónin og sum greiddu frá á Portalinum í gjár.

Tískil vónar hon sjálvsagt, at Løgtingið fer at samtykkja uppskotið.

Men hon vísir á, at tá ið tað verður staðfest í sjálvari ferðslulógini, at null hugsjónin er endamálið við ferðslulógini, er tað bara byrjanin, tí tað er ikki fyrrenn tað er samtykt, at arbeiðið byrjar av álvara.

– Eitt tað fyrsta, vit eiga at gera, er at fáa eina føroyska tjóðar ferðslutrygdarætlan, sum staðfestir endamálið við allari ferðslu á luftini, á landi og á sjónum.

Hon sigur, at tað, at null hugsjónin nú verður staðfest í fersðslulógini, fer at vinda øll, sum hava við ferðslu at gera, tað er Løgting, Landsverk, Akstovu og øll onnur, til altíð at hava ferðslutrygdina er aðalmálið í øllum sum gjørt verður.

Rúna Sivertsen heldur, at enn hava vit langt á mál á hesum øki.

– Viðvíkjandi flúgving ivast ongin í, at tað er trygdin, sum skal raðfestast hægst. Men tá ið vit koyra í bili, hava vit lyndi til at slaka krøvini, tí tá krevja vit at verða flutt skjótt frá staði til stað, men vit góðtaka, at hetta krevur síni offur.

Kortini heldur hon, at hugburðurin er broyttur, tí í nýggju, landsumfatandi samferðsluætlanini hjá Landsverkið, er trygdin hornasteinurin og tað er at fegnast um, sigur Rúna Sivertsen.

Annars heldur forkvinnan, at skal hon nevna nøkur ítøkilig átøk, sum tað er átrokandi at fremja fyri at bøta um ferðslutrygdina, kemur hon at hugsa um tvey tiltøk.

– Í fyrstu atløgu er at hjá teimum ungum sum taka koyrikortið, skal tann fyrsta tíðin verða royndartíð. Í øðrum lagi heldur hon, at klippikortini skulu setast í gildi í Føroyum, har ávís brot á ferðslulógina kosta klipp í kortið og tá ið kortið er fult, kostar tað koyrikortið.

Hon sigur, at eitt, sum royndarkoyrikortið til ungu kann føra við sær, er, at tey hava færri klipp enn tey eldru.

– Og í serliga grovum brotum á ferðslulógina, kann tað vera so, at løgreglan kann taka koyrikortið frá teimum ungu á staðnum, sigur Rúna Sivertsen.